ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# ADVOKATFULLTRÚI

## Vit søkja eftir einum advokatfulltrúa at byrja beinanvegin

Skrivstova okkara fæst við løgfrøðiligt arbeiði á breiðum grundarlagi. Vit umboða bæði størri og smærri privatar fyritøkur, almennar stovnar og kommunur, sum vit veita løgfrøðiligar tænastur. Vit fáast eisini við rættarmál, umframt við búviðgerð av deyðs- og trotabúgvum.

Í løtuni eru vit íalt 19 starvsfólk, harav 7 advokatar. Á skrivstovuni er eitt óhátíðarligt arbeiðsumhvørvi við góðum starvstreytum.

Vit hava nú tørv á einum fulltrúa, sum skal kunna átaka sær arbeiði innan øll okkara arbeiðsøki, men í fyrstani hugsa vit serliga um millum annað at gera ymiskt fyrifallandi løgfrøðiligt kanningar- og fyrireikingararbeiði fyri aðrar advokatar á skrivstovuni, møta í fúta- og skiftirætti bæði í Havn og sýslunum og arbeiða við innheintingarmálum.

Viðkomandi, sum settur verður í starv, skal rokna við stórari arbeiðsbyrðu, har arbeiðsdagarnir onkuntíð verða langir. Vit leggja dent á, at fulltrúin er fyrikomandi bæði mótvegis sínum starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tann, sum verður settur, skal hava evnini til at avgreiða tær ymsu uppgávurnar skjótt og væl. Eftirsum at vit eisini umboða útlendskar klientar, skal viðkomandi eisini vera væl fyri í enskum.

Tann rætti umsøkjarin kann rokna við einum spennandi og avbjóðandi starvi. Fulltrúatíðin er trý ár, íroknað skeiðvirksemi í Danmark. Løn og aðrar starvstreytir verða eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til okkara og tosa við ein av advokatunum á skrivstovuni.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast okkum til postsmogu 6, FO-110 Tórshavn ella við teldupósti til jura@jura.fo og vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. september 2009.

Frúutrød 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35
Fax: 35 33 36
www.jura.fo





# Excel I
## - tey fyrstu fetini

*Skeið til byrjarar*
*7. og 8. september '09*

**Situr tú enn við roknimaskinuni** og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini?

**Tað er nú tú hevur møguleikan** at læra og fáa stóra gleði av Excel. Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-). Teknað teg skjótast, tí plássið er sera avmarkað!

**Um Excel**
Excel er eitt rokniark, har tað er møguligt at arbeiða við tølum og grafum uppá allar hugsandi (og óhugsandi) hættir. Við at luttaka á hesum skeiðnum, fært tú grundleggjandi kunnleika til Excel. Tú lærir tær mest brúktu og mest týðandi funkurnar. Aftaná skeiðið kanst tú brúka og fáa stóra gleði av forritinum í tínum dagliga arbeiði.

**Skeiðið vendir sær til tey**, sum hava hug til, ja kanska í longri tíð hava havt hug til, at læra tær grundleggjandi, týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel.

**Tú hevur lítlar ella ongar** royndir við Excel frammanundan, men vit rokna við, at tú hevur arbeitt við teldu áður.

**Tilmelding og les meira** um skeiðið á heimasíðu okkara - www.synergi.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja.

**Vælkomin til tiltøk hjá Synergi**

Synergi

Synergi • Tvørgøta 13 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa

# Koyrikort?



## til lastbil, buss og trailara

Skeiðið byrjar
26. august kl. 19.00

John tel 21 4775

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Sjónband 357774

Vallalíð 3 - Tórshavn

# Koyrikort?

Koyrikort til persónbil fyri bert 8.995,-

Teoriskeið til persónbil byrjar 26. august kl. 17.00

*: Pakkaloysn, ið lýkur lógarásetta undirvísing

Rúni tel 21 4765
John tel 21 4775

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Sjónband 357774

Vallalíð 3 - Tórshavn

# Lesið Sosialin -so eru tit við!